Bólkur F:

# Argentina fall

**Enn ein sensatión í HM-endaspælinum gjørdist veruleiki mikumorgunin, tá Argentina ikki megnaði at koma víðari. Svøríki vann bólkin, meðan England endaði á øðrum plássi**

HM
*Stefan í Skorini*

Nú tvær av áttandapartsfinalunum eru klárar, hava tvey Norðurlond spælt seg víðari í HM-endaspælinum. Tað er greitt at Danmark skal spæl ímóti Englandi í áttandapartsfinaluni leygardagin. Svøríki skal spæla ímóti Senegal í næsta umfari.

Mikumorgunin fekk fótbóltsheimurin enn ein skelk. Argentina, sum undan kappingini var mettur sum ein av størstu favorittunum, endaði á triðja plássi í bólki F aftanfyri Svøríki og England. Suðuramerikanararnir mugu tískil fara heimaftur eftir bólkaspælið. Hetta má metast sum ein sonn gøla heima í Argentina, tí øll høvdu væntað sær nógv av argentinska liðnum hesuferð.

Argentina skuldi vinna triðja og seinasta dystin í bólkaspælinum móti Svøríki, men úrslitið gjørdist 1-1. England og Nigeria spældu ein málleysan javnleik, og tað hevði við sær, at Svøríki tók fyrsta plássið frammanfyri England við betri málmuni.

Argentina legði hart út í dystinum móti Svøríki og hevði fleiri góðar málmøguleikar fyri steðgin. Trýstið var til tíðir stórt, og eingin væntaði, at Svøríki fór at halda argentinska liðnum aftur serliga leingi.



*Sviar endaðu sera óvæntað ovast í teirra bólki, og Argentina er longu úti av endaspælinum. England fylgir Svøríki víðari í kappingini og skal møta Danmark leygardagin*
*MYND: Reuters*

**Svøríki framum**

Men støðan var 0-0 í steðginum, og miðskeiðis í seinna hálvleiki skoraði Anders Svensson eitt sera vakurt mál beinleiðis uppá fríspark. Argentina skuldi nú skora tvey mál, men tað gekk striltið at skapa møguleikar.

Tá fáir minuttir vóru eftir at spæla, varð Ariel Ortega feldur í brotsteiginum, og dómarin dømdi brotsspark. Ortega tók sjálvur, Magnus Hedman bjargaði, men Hernan Crespo var fyrstur á bóltinum og skoraði.

Seinastu minuttirnir vóru sera spennandi, men Svøríki helt fast um javnleikin og fer sostatt víðari. Hetta endaspælið hjá Argentina endaði í sorgartárum, tí liðið snávaði longu í bólkaspælinum, og tað hevði eingin væntað.

England skuldi hava javnleik móti Nigeria fyri at sleppa víðari. Enska liðið gjørdi tað neyðuga, og dysturin endaði 0-0. England hevði teir bestu málmøguleikarnar, men Nigeria lá sanniliga eisini framvið, so spenningurin var varðveittur til seinastu løtu.

**Argentina – Svøríki 1-1 (0-0)**
0-1: Anders Svensson
1-1: Hernan Crespo

**England – Nigeria 0-0 (0-0)**

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 2 | 3 | 7 |
| 2 | Senegal | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 4 | 1 | 5 |
| 3 | Uruguay | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 5 | -1 | 2 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 - 1 - 2 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Spania | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 2 | 4 | 6 |
| 2 | Suður Afrika | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 3 | Paraguay | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 4 | Slovenia | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 2 | Costa Rica | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 3 | Turkaland | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 4 | Kina | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Suður Korea | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 2 | USA | 2 | 1 - 1 - 0 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 3 | Portugal | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 3 | 3 | 3 |
| 4 | Póland | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur E**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 3 | 2 - 1 - 0 | 11 | 1 | 10 | 7 |
| 2 | Cameroon | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 2 | 3 | 5 |
| 3 | Írland | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 4 |
| 4 | Saudi Arabia | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 12 | -12 | 0 |

**Bólkur F**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 3 | 1 - 2 - 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 2 | Ongland | 3 | 1 - 2 - 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 3 | Argentina | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 | Nigeria | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |

**Bólkur G**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mexico | 2 | 2 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 2 | Italia | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 | Kroatia | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 4 | Ecuador | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

**Bólkur H**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Japan | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Russland | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 | Belgia | 2 | 0 - 2 - 0 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| 4 | Tunis | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |

Bólkur E:

# Týskland vísti styrki

**Týska landsliðið vísti sína styrki, tá Kamerun varð kveistrað til viks við einum 2-0 sigri. Írland vann 3-0 á Saudi Arabia og fylgir Týsklandi víðari í kappingini**

HM
*Stefan í Skorini*

Lagt varð upp til ein spennandi endabrest í bólki E, tí trý lond høvdu møguleikan av spæla seg víðari í kappingini.

Týskland lá best fyri undan seinasta dystinum og skuldi bara hava ein javnleik fyri at koma víðari. Kamerun skuldi hinvegin vinna dystin, og Írland skuldi vinna við meira enn einum máli móti Saudi Arabia fyri at tryggja sær víðari luttøku.

**Nógv gul kort**

Dómarin í dystinum millum Týskland og Kamerun gjørdi rættiliga vart við seg, tí hann tveitti um seg við einari rúgvu av gulum kortum. Tilsamans sekstan ferðir hevði spanski dómarin gula kortið á lofti. Ein leikari hjá hvørjum liði fekk tvey gul og harvið reytt kort.

Fyri steðgin var Kamerun vandamiklari frammanfyri málinum og hevði fleiri góðar royndir, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin inn, hóast møguleikarnir vóru ógvuliga stórir. Tá Carsten Ramelow stutt fyri steðgin fekk seinna gula kortið, og Týskland skuldi spæla við tíggju monnum, væntaðu tey flestu, at týskarar fingu ein tungan burð í seinna hálvleiki.

Men fimm minuttir eftir steðgin sendi Miroslav Klose til Marco Bode, sum var leysur við málverjanum og skoraði. Eftir hetta tók Týskland seg langt aftur á vøllin og royndi seg við skjótálopum.

Seint í dystinum varð Patrick Suffo hjá Kamerun eisini rikin av vølli, og stutt eftir skallaði Miroslav Klose sítt fimta mál í hesum endaspælinum, og tá var dysturin avgjørdur.

**Írland víðari**

Tað eydnaðist eisini Írlandi at tryggja sær pláss í 1/8-finalunum. Írarnir skuldu vinna við meira enn einum máli fyri at koma víðari. Írska liðið greiddi sína skyldu og vann 3-0 a Saudi Arabia.

Robbie Keane skoraði heilt tíðliga í dystinum, tá hann var hægstur eftir eitt innlegg. Saudi Arabia beit rættiliga frá sær sum hálvleikurin leið, men Írland helt fast.

Í seinna hálvleiki stýrdi Írland dystinum, og tá hálvur tími var eftir, skallaði verjuleikarin Gary Breen næsta málið í dystinum. Damien Duff skoraði seinasta málið, og eingin ivi var um vinnaran av dystinum.

Hetta endaspælið gjørdist rættiliga miseydnað hjá Saudi Arabia, tí tólv mál fóru ígjøgnum, og liðið fekk einki mál.

**Týskland – Kamerun 2-0 (0-0)**
1-0: Marco Bode
2-0: Miroslav Klose

**Írland – Saudi Arabia 3-0 (1-0)**
1-0: Robbie Keane
2-0: Gary Breen
3-0: Damien Duff

**Máltindurin, HM**

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Marc Wilmots | Belgia | 2 |
| Rivaldo | Brasilia | 2 |
| Ronaldo | Brasilia | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Fernando Morientes | Spania | 2 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 2 |
| Robbie Keane | Írland | 2 |



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til veg- og kloakkdeildina hjá Tórshavnar kommunu at byrja beinanvegin.

Áhugað kunnu venda sær til Jógvan Páll Berg ella Finnboga Johannesen tlf. 31 51 60, áðrenn fíggjadagin 28. juni 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsmaður

Til gøtuljósdeildina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum arbeiðsmanni at byrja skjótast gjørligt.

Send skrivliga umsókn til Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn.

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja til Jákup Joensen ella Viggo Christiansen 31 51 60

SNARSKIVAN

ÚTGREVSTUR v.m.

TILBOÐ VERÐA GIVIN



Sp/f DAHL

180 Kaldbak
214321 · 317321

Ístaðin fyri at keypa nýtt



Vit lakera alt innbúgv, so tað verður sum nýtt.

Skápshurðar og innhurðar

Ein bíligari loysn

Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 · Tlf. 321206 · fax 321236 eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

Gott stevnubingo

verður í bygdarhúsinum í Hósvík mikukvøldið 19. juni kl. 19:00
- Nógvir góðir vinningar

Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdafelagið Varðin

Nubira II CDX 2.0

Tann nógv eftirspurdi 2,0 stc er nú aftur á goymslu

Lanos 5DR



kr. 145.000,-

Matiz



kr. 103.000,-

Tacuma



kr. 174.000,-



174.000,-

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29